# Villini blómur í SvF

**Sjónvarp Føroya er í løtuni í gongd við at taka upp sendingar um villini blómur í føroysku náttúruni. Tað er Bergljót D. Hentze, sum leggur sendingarnar til rættis. Afturat sær hevur hon plantufrøðingin, Onnu Mariu Fossá**

SJÓNVARPSENDING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Vakra føroyska náttúran og hennara ríka plantulív verða sett í hásætið í fýra sjónvarpssendingum hjá Bergljót D. Hentze. Sjónvarp Føroya er nevniliga í løtuni í holt við at framleiða nakrar sendingar um villini blómur í føroysku náttúruni.

Bergljót D. Hentze, sum leggur sendingarnar til rættis, sigur, at orsøkin til, at valt varð at fara undir slíkar sendingar er, at á Náttúrugripasavninum er ein urtagarður við føroyskum plantum. Men ístaðin fyri bara at halda seg har, so var stuttligari at fara út í sjálva náttúruna at hyggja eftir teimum.

Anna Maria Fossá, sum er plantufrøðingur á Náttúrugripasavninum, er við í sendingunum, har hon greiðir frá blómunum, ið funnar verða.



*Anna Maria Fossá, plantufrøðingur greiðir frá um blómurnar, og tað er Ragnar C. Joensen, sum tekur upp*

*Mynd: SvF*

### Í fjall og fjøru

Talan verður helst um eini fýra sendingar, sum verða umleið hálvan tímar til longdar.

– Vit ferðast runt ymsastaðni í Føroyum. Ein sending verður í fjøllunum, ein við strendurnar, ein í gjáum og ein við áir og vøtn, greiðir Bergljót D. Hentze frá.

Millum annað hevur upptøkuliðið verið uppi á Slættaratindi og hugt eftir plantum har. Sendingarnar verða tiknar upp í hesum døgum, tá veðrið er til tað.

Tað er Ragnar C. Joensen, sum tekur sendingarnar upp, og enn er ikki avgjørt, nær tær verða sendar.

### Sjáldsom sløg

Sambært Onnu Mariu Fossá hava vit nógv sjáldsom plantusløg í Føroyum. Sagt verður, at í Føroyum eru um 330 sløg av plantum.

– Vit royna í sendingunum at vísa á tann sjáldsama vøksturin, sigur Anna Maria Fossá. Hon er útbúgvin plantufrøðingur, og í doktararitgerðini hevur hon skrivað um fjallavøkstur og veðurlagsbroytingar í Føroyum.

Hon sigur, at tað hevur verið eitt sindur trupult við upptøkunum av sendingunum. Hetta kemst av, at hon sjálv hevði viljað víst á planturnar, tá tær standa í blóma. Tað er tó torført at koma á eitt øki, har allar planturnar standa í blóma í senn.

Eisini hevur veðrið ikki verið heilt til vildar hvørja ferð, men sum heild letur Anna Maria Fossá tó væl at.



*Ein sjósólja – snjósólja er artiskur gróður. Tað vil siga, at tær vaksa bert omanfyri 400 metrar*

*Mynd: SvF*



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK JULI 2004**

**SKRÁIN VIKA 30-31**

**Sunnudagur 25. juli**
**Kl. 16.00** **Konsert við Sigrið Rasmussen og Gunnar Guttesen**
Atgongumerki á kr. 100 eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn.

**Mikudagur 28. juli**
**Ólavsøkuaftan, húsið er opið frá 14.00-20.00**

**Hósdagur 29. juli**
**Ólavsøkudagur, húsið er opið frá 14.00-20.00**

**Fríggjadagur 30. juli**
**Húsið er opið frá 14.00-18.00**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**



# Óli ger føroyingum órætt



*– Í 10 ár havi eg verið við í hjálpararbeiði til neyðstødd - og mínar royndir eru ikki tær somu, sum tær hjá Óla Jacobsen. Føroyingar eru sera skjótir at hjálpa. Tað er órættvís at koyra øll undir eitt, tí tað er ikki smávegis, sum fólk vilja geva, sigur Absalon Matras*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

**- Tá eg las greinina hjá Óla Jacobsen, um at føroyingar eru líkasælir og ongar idealistar eiga, gjødist eg skakkur. Tað, sum eg fái at vita í mínum arbeiði uttanlands er, at tað er merkisvert, at eitt so lítið land sum Føroyar megna geva og hjálpa so nógv. Hetta sigur Absalon Matras av Norðoyri, sum í 10 ár hevur ferðast til Rumenia við hjálp**

FØROYINGAR OG IDEALISMA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Herfyri segði Óli Jacobsen við Sosialin, at hansara royndir í Amnesty hava víst honum, at tað er sera torført at fáa føroyingar at engagera seg í veruligar trupulleikar og taka aktiv stig til at hjálpa neyðstøddum menniskjum.

Hesi orð harmast Absalon Matras um.

Í 10 ár hevur hann ferðast til Rumenia við hjálp til neyðstødd har. Hann skilir ikki, at lopið verður soleiðis á fólk, ið meira enn nakað annað fólkaslag eru tilreiðar at hjálpa og geva.

– Tey eru mong, bæði ung og gomul, ið stuðla mær í mínum arbeiði fíggjarliga og á annan hátt. Og tað er ikki smávegis, ið fólk lata meg fáa at geva teimum fátøku har niðri, sigur Absalon.

Hann sigur, at tað er ikki bara hann, sum koyrir til Rumenia við hjálp, men eisini menn og kvinnur úr Brøðrasamkomuni, og hann heldur, at orðini hjá Óla Jacobsen má hann sjálvur standa fyri, tí tey eru als ikki veruleiki.

Hann vísir eisini á Kosovo-hjálpina fyri fáum árum síðani, sum nærum øll føroyska tjóðin stóð saman um og var við til at savna 5-6 milliónir krónur inn fyri Reyða Kross.Tá Doulos var í Føroyum fyrr í mánaðinum, fór skipið avstað aftur við fullum tangum og hópin av provianti, sum skipið fekk í gávu.

Hann sigur, at føroyingar eru serstakliga gávumildir og hjálpsamir og eiga stóra tøkk uppiborna.

– Tað kann vera, at nøkur eru, sum ynskja sær betur umstøður at ballast í, men at leggja eina heila tjóð undir líkasælu av tí orsøk er órættvíst, sigur Absalon at enda.

KPMG

**Summarfrí**

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí
frá mánadegnum 26. juli 2004.

Opið verður aftur mánadagin 9. august 2004.

**KPMG statsaut. revisorar Sp/f**
kpmg@kpmg.fo • www.kpmg.fo

Tórshavn
Staravegur 17 · Postboks 3258
Telefon 34 34 34 · Telefax 34 34 35

Saltangará
Heiðavegur 15 · Postboks 190
Telefon 34 34 54 · Telefax 474 475



**Tað kundi jú hent, at bilurin ikki vildi sum tú vildi...**

Skalt tú uttanlands at ferðast við bili, átti tú at víðka tína biltrygging við Trygd Bilhjálp.

Trygd Bilhjálp fevnir um nærum alla bilhjálp sum t.d. útreiðslur til kranabil, tænastubil og starthjálp í sambandi við óhapp, motorsteðg, punktering, manglandi brennievni ella líknandi trupulleikar við bilinum.

Við Trygd Bilhjálp kanst tú alt samdøgrið, alt árið, fáa hjálp bæði her í landinum og í Evropa, uttan at hugsa um rokningina. Trygd hevur avtalu við Falck í Danmark, soleiðis at tú fært hjálp, um tú ert í Danmark ella aðrastaðni í Evropa.

Við Trygd Bilhjálp rindar tú einans kr. 422 um árið, um bilurin er undir 6 ár og kr. 543, um bilurin er 6 ár ella meiri.

Set teg í samband við Trygd á 358100 ella eina av deildunum hjá Føroya Banka, og fáa tína biltrygging víðkaða við Trygd Bilhjálp.

*Ikki bara tryggingar, men eisini trygd*

TRYGD

Gongin 7 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 35 81 00 Fax 31 72 11
e-mail: trygd@trygd.fo www.trygd.fo